**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1744.**
**Tíðarskeið: 6/9-13/9 - 2017**

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, Helga Bára Mohr Vang, Marit Pedersen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, brosmu, longu og blálongu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, hýsu og mathøgguslokki varð selt til matstovuvinnuna í Havn. Nytrur vóru eisini tiknar av brosmu, longu og blálongu.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 6/9 kl 21:30. Tóku støðir hósdagin í norðara/eystara parti av bankanum og fríggjadagin mitt á bankanum. Leygardagin tóku vit støðir í vestara kanti. Sunnudagin og mánadagin tóku vit støðir suður/vesturi á bankanum; tó var trolið fleiri ferðir fast ella skrætt. Týsdagin tóku vit støðir í eystara parti av bankanum. Tóku 28 góðkendar fiskistøðir; ein støð við korallum varð tó ikki tikin. Allar 12 CTD-støðirnar vórðu tiknar. Veðrið var sum heild sera gott, tó at nakað av vindi var mánadagin. Vóru á Havnini mikumorgunin og landaðu kl. 07:00.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var bert eftir ætlan fyri hýsu (umleið 400). Vit fingu ov lítið av toski og upsa til at náa ætlaða talið av nytrum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 12. september. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit:** Tað var framvegis sera lítið av toski (Talva 1, Mynd 1). Hetta var toskur av øllum støddum og ikki bert sera stórur toskur eins og vanligt plagar at vera. Vit fingu umleið dupult so nógv av hýsu sum í fjør og byrjar nøgdin av hýsu at líkjast tí, sum fyrr var vanligt (Mynd 1). Hetta var fyri tað mesta smá hýsa. Sera lítið var at fáa av upsa. Magakanningarnar vístu, at tað var nakað til av stórari nebbasild, meðan nøgdin av krabbdýrum var sera lítil.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1744 – yvirlitstroling á Føroyabanka.

| Fiskaslag | KG 28 hál | Nytrur | Magar | KG 24 hál í fjør | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| HYSA | 14522.019 | 420 | 94 | 6675.287 | 1.86 |
| HAVMUS | 1886.752 | | | 1416.904 | 1.14 |
| LOLIGO | 1093.442 | | | 275.487 | 3.40 |
| SVARTKJAFTUR | 782.368 | | | 467.436 | 1.43 |
| TOSKUR | 378.428 | 61 | 40 | 108.350 | 2.99 |
| GLYSUFISKUR | 314.226 | | | 374.892 | 0.72 |
| GULLAKSUR | 265.020 | | | 874.082 | 0.26 |
| LONGA | 233.035 | 43 | 4 | 180.040 | 1.11 |
| SILVUR MURTUR | 230.684 | | | 136.637 | 1.45 |
| S. VIVIPARUS | 146.446 | | | 245.704 | 0.51 |
| UPSI | 125.835 | 25 | 12 | 478.383 | 0.23 |
| HAVTASKA | 108.315 | 4 | 3 | 70.939 | 1.31 |
| HVITINGUR | 94.003 | | | 57.564 | 1.40 |
| GLASKVOYSA | 92.062 | | | 50.262 | 1.57 |
| AGNHOEGGUSLOKKUR | 84.665 | | | 17.662 | 4.11 |
| HVITINGSBRODIR | 75.893 | | | 9.827 | 6.62 |
| KNURRHANI | 73.781 | | | 229.216 | 0.28 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 72.189 | | | 65.099 | 0.95 |
| S. MARINUS | 72.125 | | | 29.110 | 2.12 |
| SANDSPROEKA (LL) | 36.790 | | | 23.101 | 1.37 |
| TUNGA | 27.128 | | | 38.296 | 0.61 |
| SKOETA(BATIS) | 24.710 | | | 14.930 | 1.42 |
| LOPHELIA PERTUSA | 15.555 | | | | |
| ECHINIDAE(IGULKER) | 14.295 | | | 8.793 | 1.39 |
| LITLA BROSMA | 12.125 | | | | |
| BUKSVARTI HAVUR | 10.070 | | | | |
| NAGLASKOETA | 9.930 | | | | |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 8.737 | | | | |
| KJAFTSVARTI HAVUR | 8.567 | | | | |
| PURPURIGULKER | 7.755 | | | 0.927 | 7.17 |
| BROSMA | 7.470 | 3 | | 32.575 | 0.20 |
| SANDSKOETA | 5.680 | | | | |
| BLALONGA | 4.370 | 3 | 3 | 31.335 | 0.12 |
| GEODIA SP | 3.480 | | | 104.079 | 0.03 |
| ALCYONIUM | 3.380 | | | 0.977 | 2.97 |
| STREYMSILD | 3.256 | | | 2.980 | 0.94 |
| GAMAL FISKUR | 2.250 | | | 88.939 | 0.02 |
| SKADDUR FISKUR | 1.848 | | | | |
| LALLA | 1.703 | | | | |
| SKRAMBUL | 0.455 | | | 0.110 | 3.55 |
| BIVALVIA(DEYD) | 0.351 | | | | |
| HUMMARI | 0.305 | | | 0.520 | 0.50 |
| TILSAMANS | 20861.498 | 559 | 156 | | |




Mynd 1. Nøgd av toski og hýsu per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum "Tur1744d.doc".



Petur Steingrund